

KRINGVARP FØROYA

# PUBLIC SERVICE-FRÁGREIÐING 2020

Formæli . . . 3
Framleiðsluyvirlit . . . 4
Álit . . . 6
Aktuelt . . . 8
Mentan og samfelag . . . 16
Ítróttur . . . 24
SavnsGull . . . 25
Átrúnaður . . . 28
Børn og ung . . . 31
Søgur . . . 36
Tónleikur . . . 37
Public service . . . 40

**Forsíðumynd:** Jakob Jørgensen
**Myndir:** Bjarni Rubeksen og egnar myndir
**Uppseting:** Svanna Højgaard Joensen





# ØÐRVÍSI AVBJÓÐINGAR

Ongin kundi við ársbyrjan ímynda sær hendingarnar, sum settu dám á 2020. Koronufarsóttin førdi til, at leiðslan 11. mars setti umfatandi átøk í verk á stovninum til tess at minka um smittuvandan millum starvsfólk. Sum partur av tilbúgvingini skal Kringvarpið tryggja, at føroyingar framhaldandi fáa tíðindi og kunning. Arbeiðsgongdir vórðu broyttar, og fleiri starvsfólk arbeiddu nú heima. Stutt eftir setti løgmaður Føroyar niður í ferð, og forhøllin í Kringvarpinum gjørdist karmur um eina røð av tíðindafundum hjá landsstýrinum um koronu.

Alt í alt megnaði Kringvarpið avbjóðingarnar, sum stóðust av koronu, væl. Framleiðnið minkaði eitt stutt skifti, men stovnurin lagaði seg skjótt til broytingarnar. Við ársenda staðfestu vit, at útboðið av føroyskum tilfari í einum ári hevur ongantíð verið størri enn tað sama. Vøksturin var 5 prosent, og senditíðin táttaði nú í 10.000 tímar.

### NÝGGJAR LEIÐIR OG NÝGGJAR TÆNASTUR

Kringvarpið gekk nýggjar leiðir í sambandi við kommunuvalið í november. Borgarar í øllum kommunum komu til orðanna, eins og skipað varð fyri veljarafundum úti kring landið. Valkvøldið hevði sjónvarpið seks upptøkuhølir kring oyggjarnar. Heimasíðan og sosialu miðlarnir fingu ein virknari leiklut, tí journalistarnir kring landið sendu inn tilfar, sum varð tikið upp við fartelefonum. Leisturin at flyta kommunuvalið nærri borgarunum eydnaðist væl, og Kringvarpið fer at menna hetta í framtíðini.

Koronufarsóttin rakti, sum vera man, ítróttin og mentanina meint. Talið av stórum ítróttarframleiðslum minkaði munandi. Sendingin 3-2 legði tó á annan bógv við fleiri gestum í sjónvarpsstovuni og drúgvari viðgerðum av ítróttinum.

Kringvarpið samstarvaði við fyriskiparar av mentanartiltøkum og varpaði nógv tiltøk út, nú áskoðarar ikki sluppu til tiltøkini. Ongantíð fyrr hevur sjónvarpið sent so nógvar tónleikaframførslur sum í 2020. Vit fegnast um, at hetta samstarvið við mentanarøkið hepnaðist so væl.

Tænastan varð ment á fleiri økjum í 2020. Ein nýggj tekstskipan gjørdi, at hoyriveik kundu fylgja við tíðindafundunum. Allar Dag og Viku-sendingarnar vórðu tekstaðar og síðan lagdar á heimasíðuna.

Rúgvismikla sálmasavnið varð lagt á heimasíðuna og bleiv brúkt í mongum kirkjum og í føroyskum guðstænastum í Danmark. Kringvarpið fór eisini at sjónvarpa guðstænastur beinleiðis.

Vit leggja stóran dent á barnaøkið. Tá korona gjørdi mest um seg, var koronubarnaútvarp á skránni hvønn gerandismorgun. Nýggja sjónvarpstíðindasendingin til børnini í skúlaaldri – Sakin – fekk góða undirtøku. Nýskrivaða útvarpsleikrøðin Fornt var stóra jólagávan til børnini í desember. Samstarv var við Nám, sum gjørdi undirvísingartilfar til fólkaskúlan úr leikrøðini um telduspælið.

Nýggja ungdómsverkætlanin Biit fór av bakkastokki um ársskiftið. Miðlanýtslan hjá teimum ungu fer fram á netinum. Tí framleiðir redaktiónin, sum er mannað av ungum, føroyskt tilfar til Biit.fo burturav, eins og partur av tilfarinum er á eitt nú Spotify og poddvarpappini hjá Apple.

### TANN STÓRA UPPGÁVAN

Størsta mentanarliga avbjóðingin hesi árini er flóðaldan av útlendskum tilfari, sum brýtur inn yvir okkum gjøgnum risastóru, altjóða stroymingartænasturnar. Broyttu miðlavanarnir hava við sær, at fólk brúka minni tíð til alt tað, sum er føroyskt. Hetta setir mentanina og málið undir trýst. Um vit lata standa til, verður hetta ein alsamt vaksandi avbjóðing fyri okkara siðmenning. Evnið varð viðgjørt á stóru public service-ráðstevnuni, sum KVF skipaði fyri á Hotel Føroyum í oktober. Ein niðurstøða var, at týdningurin av einum sterkum kringvarpi, sum kann savna føroyingar um tíðindi og mentan í breiðasta týdningi, er størri enn nakrantíð.

Uppskot um átøk, sum kunnu stimbra savningarmegina í føroyska samfelagnum, seta eisini sín dám á uppskotið hjá Kringvarpinum til nýggja public service-sáttmálan. Uppgávan er stór, men vit síggja fram til at loysa hana við góðum treysti.

Við ynskjum um eitt gott ár fyri KVF og brúkarar tess.

***Ivan Hentze Niclasen, kringvarpsstjóri***

# SENDIR TÍMAR

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Aktuelt | 715 | 140 | 855 |
| Tónleikasendingar | 4.679 | 65 | 4.744 |
| Infotainment | 1.464 | 43 | 1.507 |
| Børn/ung | 195 | 310 | 505 |
| Átrúnaður | 326 | 74 | 400 |
| Mentan | 1.165 | 207 | 1.372 |
| Ítróttur | 210 | 120 | 330 |
| **Samanlagt** | **8.754** | **959** | **9.713** |

Yvirlitið vísir føroyska framleiðslu, endursendingar íroknaðar. Kringvarpið framleiddi í 2020 meira enn nakrantíð áður.

Bólkarnir fevna um hesar sendingar:

**AKTUELT**
Útvarpstíðindi, Dagur og Vika, tíðindafundir, minidokumentarar, Breddin og Pressan.

**TÓNLEIKASENDINGAR**
Tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA og aðrar konsertir.

**INFOTAINMENT**
Orðið er heiti fyri sendingar, ið kunnu bólkast sum bæði "information" og "entertainment". Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Góðan Morgun Føroyar, sendingin Vikuskiftið, Leygardagur, Ólavsøkuprát, Gekkurin, Summargestir o.tl.

**BØRN OG UNG**
Barnaútvarpið og allar barnasendingar í sjónvarpi, bæði føroyskar og týddar.

**ÁTRÚNAÐUR**
Morgunlestrar, andaktir, guðstænastur, møti og sendingin Credo.

**MENTAN**
Mentanarsendingar, Nón, siðsøga (t.d. Meg Minnist), samrøður, frásagnir (Við Tórði á túri o.l.), náttúrusendingar, dokumentarsendingar hóskvøld, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleikasendingar við samrøðum, ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

**ÍTRÓTTUR**
Ítróttasendingin í útvarpinum í vikuskiftunum, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbólti og hondbólti, finalur í hondbólti, flogbólti, fótbólti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbólti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.






# ÁLITISBAROMETRIÐ

Síðan februar 2016 hevur Spyr.fo regluliga kannað, hvussu tað stendur til við áliti føroyinga til Kringvarp Føroya og aðrar føroyskar miðlar. Álit er ein av fortreytunum fyri tilveruræattinum hjá Kringvarpi Føroya, og er hetta nakað, sum stovnurin arbeiðir miðvíst við at varðveita og betra.

500 fólk í aldursbólkunum 18-29, 30-44, 45-59 og 60-80 ár í øllum landinum verða sostatt regluliga biðin um at meta um, hvussu stórt álit tey hava á føroyskum tíðindamiðlum sum heild og á Kringvarpi Føroya. Tílíkar spurnarkanningar skulu altíð takast við ávísum fyrivarni, tó kunnu afturvendandi spurnarkanningar sum hesar geva nakrar góðar ábendingar.

Álitsbarometrið gongur frá 1 upp til 7, sum er fult álit. Álitið er kannað 17 ferðir, og í seinastu kanningini vísti barometrið eina meting á 4,65. Heildarmyndin vísir, at álitisbarometrið hevur verið støðugt hækkandi við onkrum smávegis sveiggi, síðan Spyr.fo byrjaði at gera hesa kanning fyri Kringvarpið. Talvan niðanfyri vísir samlaða álitið á føroyskar miðlar í mun til álitið á Kringvarpi Føroya.

**Hvussu stórt álit hevur tú á hesum miðlum?**




**Álit á føroyskar tíðindamiðlar samanborið við álit á KVF**




**Álit á KVF sum tíðindamiðil**






# AKTUELT MÁTTI HUGSAST AV NÝGGJUM

Koronufarsóttin gjørdi stór inntriv í arbeiðsdagin hjá Aktuelt í 2020. Allar framleiðslur máttu leggjast um, vaktarsetingar gerast heilt av nýggjum og starvsfólk venja seg at arbeiða heilt øðrvísi enn vant. Við stórum vælvilja frá starvsfólkunum bar tað til, samstundis sum Kringvarpið gjørdi sína skyldu sum partur av tilbúgvingini.

Kringvarpið var millum fyrstu stovnar í landinum, sum legði alt virksemið á stovninum um í sambandi við, at koronufarsóttin so brádliga fór at gera um seg hjá okkum. Eftir kreppufund í leiðsluni mikudagin 11. mars 2020 varð millum annað øll framleiðsla og vaktarætlan á Aktuelt løgd um dagin eftir. Breddin varð fyribils tikin av skrá.

Fyri at binda um heilan fingur vórðu tvey toymi skipað í útvarpinum og tvey toymi í sjónvarpinum, sum arbeiddu aðru hvørja viku í byrjanini.

Grundgevingin var, at um eitt toymi mátti leggja kongin vegna sjúku, so var hitt klárt at taka við. Redaktiónsfundir vórðu skipaðir á Teams. Í sjónvarpinum vórðu journalistar og fotografar paraðir frá morgunstundini av og komu tí ongantíð í samband við hini. Starvsfólkini fingu útflýggjaðar farteldur, sum gingu upp á skift, alt eftir hvør var á vakt.

Hetta varð gjørt í eini skjótari vending og varð tillagað so við og við, tí í longdini gjørdist arbeiðslagið ov stirvið.

## PARTUR AV TILBÚGVINGINI

Landsstýrið skipaði fyri tíðindafundum í mars í sambandi við koronu. Hesir vóru ávikavist í Heilsumálaráðnum og í Tinganesi, og hesir fundir vórðu sendir beinleiðis í útvarpi og sjónvarpi. Tað gjørdist tó rættiliga skjótt greitt, at tað var nærum vónleyst hjá Kringvarpinum við stuttum skotbrái at gera klárt til tíðindafundirnar, og hølini vóru heldur ikki hóskandi, um vit eisini skuldu hava teknmálstulk.

Kringvarpið bjóðaði seg tískil fram at hýsa tíðindafundunum í kringvarpsbygninginum, so tíðindafundirnir kundu skipast í eini skjótari vending í hølum, har tað bar til at halda koronutilmælini, og teknmálstulkurin fekk umstøður at gera sítt arbeiði. Ein skipan varð eisini keypt, so tað bar til at blogga frá fundunum, so tey hoyriveiku kundu fylgja við.

Hetta legði sjálvsagt eitt stórt trýst á Aktuelt. Teir fyrstu fundirnir vórðu eisini útbygdir við eyka Dag og viku-sendingum, so vit kundu seta uppfylgjandi spurningar. Hetta ávirkaði eisini útvarpstíðindini, sum í stóran mun vóru ávirkað av støðuni við koronu.

Í hesum føri metti Kringvarpið seg vera part av tilbúgvingini, og tí varð alt sett til. Sum fráleið gjørdust fundirnir færri, og aðrir partar av pressuni settu spurnartekin við, um Kringvarpið læt seg brúka av politikarunum. Kringvarpið var tó av tí fatan, at stovnurin hevði skyldu at halda fólk kunnað so væl gjørligt í hesi óvissu tíð, og tí varð hildið fast um at hýsa tíðindafundunum.

## SJÓNVARP

Nógvar broytingar vórðu framdar í Degi og viku í 2019, og í 2020 royndu vit at fóta okkum í broytingunum.

Ein av stóru broytingunum var, at Dagur og vika gjørdist ein samansjóðing av tíðindum og einum meira perspektiverandi parti. Leiklutirnir hjá verti og redaktøri vórðu munandi broyttar í umleggingini, tá hesar vórðu lagdar saman, har vit fingu vert/redaktør og so ein hjálparredaktør. Tað gjørdi, at sendingarnar kundu vera rættiliga ymiskar, bæði í longd og innihaldi, men sum frá er liðið, er hetta komið í eina rættiliga fasta legu, hóast vit framvegis arbeiða við at menna hendan partin.

Nakrar broytingar eru eisini gjørdar í sjálvari sjónvarpsstovuni, so vit fáa meira burtur úr tí avmarkaða plássinum.

*Stutt-dokumentarar:* Farið varð eisini undir at menna eina skipan við stutt-dokumentarum. Hesir kunnu liggja inni í endanum av Degi og viku, um longdin er millum átta og fimtan minuttir. Verða teir longri, verða teir lagdir aftan á Dag og viku. Endamálið er at seta nøkur serlig mál á breddan, sum verða viðgjørd nærri og perspektiverað. Hetta er eitt millumting millum tey stuttu tíðindainnsløgini og tær longu sendingarnar, sum taka langa tíð at framleiða. Tílíkar sendingar eru eisini mennandi fyri tað einstaka tíðindafólkið at framleiða og skulu setast inn í vaktarskipanina fyri at fáa regluligar sendingar, eina til tvær um mánaðin.

Í 2020 vórðu teir fyrstu stutt-dokumentararnir framleiddir. Tann fyrsti snúði seg um støðuna hjá Atlantsflogi í sambandi við koronu og var 12 minuttir til longdar við kjaki aftaná. Nakrar líknandi framleiðslur hava verið síðan og skulu koma í fasta legu í 2021.

## ÚTVARP

Tíðindini í útvarpinum eru av alstórum týdningi fyri Kringvarp Føroya. Dagligu tíðindasendingarnar halda føroyingar dagførdar um, hvat hendir, men vit vilja eisini sleppa meira í dýpdina í útvarpinum. Í 2019 byrjaði sendingin Breddin, sum er mannaður við eini redaktión við trimum fólkum. Útvarpstíðindini og Breddin skulu síggjast sum ein eind, har fólk eisini ferðast ímillum og fáa ein meira fjølbroyttan arbeiðsdag.

Sendingin verður send tríggjar ferðir um vikuna og arbeiðir í stóran mun við perspektiverandi journalistikki og hevur møguleikan at fara meira niður í styttri tíðindasøgurnar, sum verða framleiddar til tíðindasendingarnar.

## HEIMASÍÐA OG SOSIALIR MIÐLAR

Heimasíða og sosialir miðlar eru eitt øki, sum skal mennast, og frá januar 2020 var redaktiónin mannað við einum journalisti afturat, so tað nú eru tveir. Ein størri verkætlan at menna heimasíðu og sosialu miðlarnar byrjaði eisini í 2020, men kom ikki á mál. Hetta arbeiðið var eisini darvað av koronu. Heimasíðan og sosialu miðlarnir fingu tó ein serstakliga týðandi leiklut í sambandi við kommunuvalið. Menningararbeiðið heldur fram í 2021, so vit vónandi fáa eina betri samansjóðing av øllum pallum á netinum, ásannandi at netið er vegurin inn í framtíðina.

## ÍTRÓTTUR

Ítróttarredaksjónin ger eina vikuliga ítróttarsjónvarpssending, 3-2, mánakvøld kl. 19.30 og ítróttartíðindi til Dag og viku hóskvøld. Kappróður verður sendur beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi og í útvarpssendingini “Bólturin” í sambandi við beinleiðis frásøgn frá bestu mansdeildini í fótbólti.













3-2 fekk nýggjan ham í 2020 og minnir í dag í stóran mun um Dag og viku. Nógvir gestir eru í sjónvarpsstovuni at viðgera aktuellan ítrótt, og nógvar beinleiðis samrøður eru eisini við fólk kring landið. Sendingin er eisini munandi longri, enn hon upprunaliga var.

Koronufarsótttin rakti ítróttin serstakliga meint, tí fleiri kappingar, dystir og tiltøk vórðu avlýst ella útsett. Hetta órógvaði almikið, og tí vóru nógv færri ítróttarframleiðslur enn vanligt í 2020. Nakrar vórðu eisini útsettar og fullu so saman við øðrum framleiðslum, tá nýggjar tíðir vórðu settar á.

## KOMMUNUVAL

10. november 2020 var kommunuval, og sum altíð er tað ein spennandi og stór framleiðsla, serliga sjálvt valkvøldið, men eisini upp undir sjálvt valið. Hesa ferð gjørdi Kringvarpið av at skipa valið við undirheitinum “Kring landið”, tí vit vildu flyta valdekningin út um landið. Hetta skuldi síggjast bæði í upptaktini og á sjálvum valkvøldinum, har viðgerðin varð flutt út kring landið, í staðin fyri í høvuðsheitum at verða greinað í sjónvarpsstovuni í Sortudíki, hóast hesin partur skuldi vera snúningsásurin við verti, journalisti og greinara.

### *Kommunuval í sjónvarpinum*

Avgerðin at fara kring landið hevði við sær, at Ferðaliðið fekk sum uppgávu at vitja í øllum kommunum kring landið. Hetta var eitt stórt átak, millum annað tí kommunurnar eru so ymiskt skipaðar. Millum annað umfata nakrar kommunur nógv fleiri bygdir enn aðrar, eins og fíggjarliga grundarlagið er sera ymiskt, umframt hvussu nógv fólk búgva í teimum. Ein treyt var, at Ferðaliðið ikki skuldi tosa við politikarar, og hetta megnaðu vit at halda við onkrum undantaki. Millum annað vistu vit ikki, hvør stillaði upp, tá átakið byrjaði. Innsløgini vórðu so víst í Degi og viku so hvørt, tey vórðu liðug og framleidd í Ferðaliðsbilinum.

Valkvøld eru í stóran mun myndað av sjónvarpinum, og soleiðis var eisini hesa ferð. Sjálvt valkvøldið varð skipað heilt øðrvísi enn undanfarin val. Av tí at kommunuval eru serstøk og ring at viðgera sentralt, gjørdu vit av at seta sjónvarpsstovur upp kring landið. Sjónvarpsstovur vórðu settar upp í Klaksvík, í Runavík, á Giljanesi, á Tvøroyri og í Høllini á Hálsi í Havn. Harumframt varð sjónvarpsstovan í Sortudíki mannað. Kring landið vóru vertur og viðmerkjari við í hvørjari sjónvarpsstovu. Til hvørja lokala sjónvarpsstovu varð eisini ein journalistur tilknýttur, sum gjørdi innsløg alt valkvøldið, bæði til sjónvarp, heimasíðu og sosialar miðlar. Úrslitini vórðu viðgjørd lokalt og træðrirnir savnaðir í Sortudíki. Hetta virkaði stak væl og gav okkum nógvar royndir, hvussu vit kunnu skipa okkum frameftir, tá kommunuval er. Tað gevur ikki stórvegis meining í sambandi við onnur val, men við nýhugsan kunnu nýggj konsept mennast út frá hesum leisti til bæði fólkatings- og løgtingsval.

### *Kommunuval í útvarpinum*

Útvarpið fór at hita upp til valið einar tvær vikur áðrenn sjálvt valið og skipaði fyri nøkrum veljarafundum kring landið, sum vóru væl umtóktir. Hesir vórðu skipaðir í magasinsendingini Breddanum. At skipa fyri veljarafundum



meðan korona herjaði, var ein stór avbjóðing, men varð loyst soleiðis, at bert valevni í lokaløkinum vórðu boðin á fund. Hetta gjørdi, at tað bar betur til at skipa fundirnar sambært teimum tilmælum, sum vóru galdandi.

Valkvøldið í útvarpinum hevði ein øðrvísi dám enn til undanfarin kommunuval, og størri dentur varð lagdur á undirhald enn at lesa úrslitini – tey vórðu jú løgd á heimasíðuna og vóru meira sjónlig og viðgjørd í sjónvarpinum. Tað var tó ein serfrøðingur knýttur at útvarpspartinum at viðgera øll úrslitini, so tað var ein ávís kapping við sjónvarpspartin.

Dagurin byrjaði annars við eini sending, Valfepur, sum Mentan stóð fyri. Hetta var ein løtt sending, sum hitaði upp allan dagin, inntil sjálvt valkvøldið tók við.

***Kommunuvalið á sosialum miðlum***
Ein redaktión varð skipað í Kringvarpinum at taka sær av sosialu miðlunum og at fóðra serliga sjónvarpið við styttri innsløgum, sum komu frá økjunum kring landið. Allir journalistarinir kring landið fingu serliga útgerð við fartelefonum, so tey kundu senda aktuelt tilfar til redaktiónina. Hetta vóru stutt klipp, sum vórðu brúkt bæði í sjónvarpinum, heimasíðuni og á sosialu miðlunum.

Hetta eydnaðist stak væl og vísti eisini, hvussu journalistarnir kunnu framleiða tilfar í eini skjótari vending, sum er væl brúkiligt á fleiri pallum.

**SENDINGAR TVØRTUR UM PALLAR OG NÝHUGSAN**
*Torradagar:* Tað er afturvendandi tiltak at skipa fyri politiskum kjakfundi í sambandi við Torradagarnar í Klaksvík. Hetta varð aftur gjørt í 2020, har umboð fyri allar flokkar vóru við. Aftaná varð skipað fyri einum kjaki millum fólk í vinnuni.

*Heystfagnaður:* Kringvarpið gjørdi í ár av at vera við til Heystfagnaðin á Eiði, sum var sera avmarkaður av øllum koronutiltøkunum. Millum annað var tann vælumtókti kjakfundurin í vanda, tí tað kundi ikki skipast fyri tílíkum fundi við áhoyrarum. Fyrireikararnir heittu tí á Kringvarpið at skipa fyri einum fundi, sum kundi varpa kjakið út til hyggjararnar á ein øðrvísi hátt. Kringvarpið tók hetta upp á seg og skipaði fyri einum heilt øðrvísi kjakfundi, enn hvat vit eru von við. Hugskotið við einum paneli við luttakarum varð slept, og í staðin varð skipað fyri einum fundi við bæði politikarum, bóndum og øðrum, sum høvdu sína meining um spurningin 'gongd í haga'. Talan var um eitt kjak við javnari útskifting av luttakarum. Í staðin fyri áhoyrarar varð blogg-skipanin, sum varð keypt til tey hoyriveiku í sambandi við koronutíðindafundirnar, brúkt til hyggjarar og lurtarar at senda spurningar inn til tey, sum tóku lut í orðaskiftinum. Kjakið virkaði stak væl og verður at brúka sum fyrimynd frameftir at fara kring landið at skipa fyri kjakfundum.




Í mars 2020, tá fyrsta koronubylgjan tók seg upp. Bert eitt viðskiftafólk slapp inn í Tógvhúsið í senn.

# MENTAN

Hvørt ár framleiðir Kringvarpið fleiri røðir og stakar útvarps- og sjónvarpssendingar. Hesar verða bæði gjørdar av starvsfólkum í Kringvarpinum og fríyrkisfólkum. Talan er um eina fjølbroytta skrá við tilfari, ið lýsir og viðger føroyska samfelagið. Skráin hevur public service-sáttmálan sum grundvøll.

## SJÓNVARP

### FLOGVANLUKKAN Í MYKINESI

Tann 26. september í ár vóru 50 ár liðin síðan syndarligu flogvanlukkuna í Mykinesi, ið kostaði íslendska flogskiparanum og sjey føroyskum ferðafólkum lívið. 26 fólk komu frá vanlukkuni við lívinum. Fleiri teirra fingu mein fyri lívið.

Rutuflogfarið hjá Icelandair úr Bergen til Føroya rendi á Knúk, ið er hægsta stað á Mykinesi. Eingin umborð visti, hvar tey vóru, men tað eydnaðist tveimum ferðamonnum at finna oman til bygdina og biðja um hjálp. Veðrið var av tí ringasta hendan dagin, og mykinesfólk og bjargingarfólk úr Vágum løgdu nógv fyri fyri at koma ferðafólkunum til hjálpar.

Fleiri av ferðafólkunum  og manningini vóru illa løstað. Líkindi vóru ikki at fáa tey løstaðu av oynni hvørki sjóvegis ella loftvegis. Ferðafólk og bjargingarfólk máttu liggja nátt í Mykinesi. Dagin eftir vanlukkuna vórðu tey flutt við tyrlu og sjóverjuskipi til Havnar.

Flogfarið hevði ongan svartan kassa, sum kundi avdúka, hvat var farið fram í flogfarinum undan vanlukkuni. Men orsøkin til vanlukkuna var mest sannlíkt, at ólag var á veðurradaranum, og at flogfarið tí byrjaði innflúgvingina til Vágar á skeivum staði.
Dagmar Joensen-Næs og Jens Jákup Hansen gjørdu sendingina.

### FØROYSKIR MATÚRMÆLINGAR

Sendirøð í trimum pørtum, sum snýr seg um føroyskar úrmælingar á altjóða gastronomiska pallinum. Fyrsti partur er um Jan Restorff, sum er leiðari á Michelin-matstovuni Søllerød Kro í Danmark. Í øðrum parti verður vitjað á matstovuni KOKS, har Poul Andrias Ziska er høvuðskokkur. Hann telist millum yngstu kokkarnar nakrantíð, sum hevur fingið tvær Michelin-stjørnur, og triði og seinasti partur er um Sólfinn Danielsen í Keypmannahavn, sum er eitt av undangongufólkunum á náttúruvínpallinum. Sólfinn ferðast kring knøttin og hevur smakkingar og fyrilestrar um náttúruvín.
Rólant Waag Dam og Jónfinn Stenberg gjørdu sendirøðina.

### KENDIR FØROYINGAR: POUL F. JOENSEN

Dokumentarrøð í tveimum pørtum um Poul F., sum man vera ein hin kendasti og best umtókti føroyski yrkjarin. Í nýggjari tíð hevur fólkasangarin Hanus G. Johansen veitt honum stórfingna uppreisn við sínum mongu sangtulkingum av yrkingum hansara.
Hans Petur Hansen og Suni Merkistein løgdu sendingarnar til rættis.

### VIT HERJA Á

Dokumentarrøð í trimum pørtum, har ljós verður varpað á menningarsøguna í føroyskum fótbólti. Sagt verður frá bráða skiftinum frá avbyrging og kyrru í drúgt áramál til stóra lopið í 1990 upp á Stórapall úti í Evropa.
Suni Merkistein legði til rættis, og Jónfinn Stenberg filmaði og klipti.

### DRONGURIN VIÐ SVARTA BELTINUM II

Fyri fýra árum síðan sendi Kringvarpið fyrsta dokumentarin um Høgna Kunoy Dávason, sum hevur lívshættisligu sjúkuna cystisk fibrose. Miðal livialdurin hjá teimum, sum hava cystisk fibrose, er ikki høgur, og tí tekur 16 ára gamli drongurin nógvan heilivág og er javnan á sjúkrahúsinum.




Hesin dokumentarurin er eitt framhald av hugtakandi søguni um ein drong, sum hevur høg mál, egið felag og altjóða netverk. Samstundis liva hann og familjan í skugganum av eini eirindaleysari sjúku.
Ivan Hentze Niclasen legði til rættis, og Bjarni Árting Rubeksen og Hans Petur Hansen filmaðu og kliptu.

### EINKI EITUR KLOKKA

Bert umleið tólv fólk búleikast í Fugloy um veturin. Trý teirra eru Mikkjal Petur, Emma og Amalia. Tey minnast aðrar tíðir, tá ljós var í hvørjum húsi, men hava ongar ætlanir um at flyta av oynni. Kriatúrini og náttúran geva lívinum innihald, og í Fugloy hevur klokkan einki at siga.
Dagmar Joensen-Næs og Jónfinn Stenberg gjørdu sendingina.

### IKKI ILLA MEINT

Stuttfilmurin 'Ikki illa meint' eftir Andrias Høgenni, sum vann Canal+ virðislønina á filmfestivalinum Cannes og varð tilnevndur ein Robert, varð vístur í sjónvarpinum í 2020.

Filmurin er um tær báðar Elinborg og Maritu, sum brádliga síggja hvørja aðra, meðan tær keypa inn. Tær tosa pent saman, men tað er týðiligt, at huglagið er spent, og ein uppgerð lúrir millum kølidiskarnar.
Andrias Høgenni hevur leikstjórnað 'Ikki illa meint'.

### FØROYINGAHAVNIN – HVAT NÚ?

Sending um Nordafarstøðina, betur kend sum Føroyingahavnin, sum einaferð var størsta fiskivinnu- og útgerðarhavn í øllum Grønlandi. Í sendindini verður søgan um Føroyingahavnina lýst, og spurningurin verður settur, hvat gerast skal við leivdirnar av Nordafarstøðini.
Lagt til rættis og gjørt sendingina hava Kári Mikkelsen og Jens Jákup Hansen.

### NÝGGJAR RØDDIR Á TINGI

Sending, har vit hitta tey fýra ungu, ið vórðu vald inn á ting, Bjarna Kárason Petersen, valdur fyri Framsókn, Hervør Pálsdóttir, nýggjur tinglimur fyri Tjóðveldi, Ingilín Didriksen Strøm, vald fyrstu ferð inn fyri Javnaðarflokkin og toppskoraran Beinir Johannesen úr Fólkaflokkinum, sum varð valdur við 995 atkvøðum. Seks mánaðir eftir valið settu vit teimum fýra stevnu og spurdu m.a., hvat tey høvdu lært á tingi.
Uni Arge legði til rættis, og Jógvan Eli Dam filmaði og klipti.

### LÍNUMENN

Dokumentarsending í trimum pørtum um línufiskiskapin á Flemmish Kap. Í fleiri ár hevði dokumentaristurin Zacharias Hammer tikið upp, gjørt samrøður og fingið yvirspælt gamlar super-8-upptøkur frá línufiskiskapinum við New Foundland. Kringvarpið samstarvaði við Zacharias um hetta rúgvismikla tilfar, og úrslitið bleiv tríggjar sendingar við heitinum Línumenn, søgan um teir,



ið fóru við línuskipunum yvir á Flemish Kap at fiska í seksti- og sjeytiárunum.
Zacharias Hammer legði til rættis, og Eyðun Müller Thomsen setti sendingarnar saman.

**JÓLAREIKAN**
Vit eru í Sandavági, har ymisk tiltøk eru á skránni í jólamánaðinum, og vit eru við, tá alment jólatræ fyri fyrstu ferð verður tendrað í lítlu bygdini Norðtoftum á Borðoynni. Og saman við trimum systkjum úr Múla vitja vit barnaheimið í heimbygdini, har eingin býr fast longur. Tey greiða frá, hvussu tað var í Múla um jólini í teirra uppvøkstri.
Tórður Mikkelsen legði til rættis, og Sólfríð Maria í Rók filmaði og setti saman.

**ORÐ OG TÓNAR**
Beinleiðis sjónvarp úr Reinsarínum frá tiltakinum 'Orð og Tónar'. Kringvarpið fór í samstarv við Sprotan um at senda beinleiðis bókaprát í sjónvarpinum. 'Orð og Tónar' er tiltak, har ymiskir aktuellir rithøvundar verða settir stevnu. Eisini eru ymiskar tónleikaframførslur til hvørt tiltakið. 'Orð og Tónar' varð varpað fimm ferðir beinleiðis í sjónvarpinum.

**NÁTTÚRUVÍSINDASENDINGAR Á FØROYSKUM**
Fleiri náttúruvísindasendingar frá BBC vórðu týddar til føroyskt og sendar í sjónvarpinum í 2020. Kringvarpið gjørdi avtalu um keyp av fleiri útlendskum sjónvarpssendingum um náttúruvísund í 2019, har 10 av hesum vórðu liðugt týddar og sendar í 2020. Ein røð var um Atlantshavið og tvær røðir um menniskjuna, har onnur var um teir níggju mánaðirnar í móðurlívi, og hin um menniskjakroppin. Sendingarnar eru tøkar á netinum og verða dúgliga brúktar í føroyska skúlaverkinum.
Heini Reinert hevur týtt til føroyskt, Carsten Arnskov hevur sett saman, og Kári Sólstein hevur lagt til rættis.

**KVÆÐAUPPTØKUR**
*Dvørgamoyin fagra var,*
*ið fyri honum stóð.*
*Av gulli vóru akslabond.*
*Hon perlur við jørðina dró*

Soleiðis ljóðar eitt ørindi úr Dvørgamoy (1), sum er eitt av Sjúrðarkvæðunum. Í 2020 kvóðu eiðisfólk í Dansifelagnum á Látrinum hetta væl yrkta kvæðið til eina sjónvarpssending. Kringvarpið hevði ikki nakra sjónvarpsupptøku við Dvørgamoy (1) frammanundan.

Á sama upptøkudegi í januar fingu vit eisini onnur kvæði og vísur, sum ikki vóru í sjónbandasavninum, og tann longsta upptøkan nakrantíð til sjónvarp varð tikin upp henda dagin.

Hetta var fimta ferðin, at Kringvarp Føroya og Sláið Ring saman skipaðu fyri einum stórum upptøkutiltaki. Tilsamans eru um 60 kvæði, vísur og tættir tikin upp á upptøkudøgum hjá Sláið Ring og Kringvarpi Føroya seinastu seks árini.












Kvæðini vóru á skránni á ólavsøku og annað jólakvøld. Hesar nýggju upptøkurnar eru stórur mentanarligur fongur, tí kvæðini og dansurin eru okkara stóri mentanararvur.

## ÚTVARP

**NÓN Í BROYTTUM HAMI**
Nón er seinnapartssendingin í útvarpinum, sum hevur mentan og samfelag sum karm. Nón leggur seg eftir at viðgera mentan í breiðum týdningi, og lyklaorð fyri sendingina eru hugleiðing og umhugsni.

Nón bleiv eins og so nógv annað ávirkað av koronufarsóttini, og saman við øðrum umstøðum varð senditíðin nakað minni í 2020 enn árini frammanundan. Har Nón áður sendi seks tímar um vikuna, fór Nón niður í tríggjar tímar um vikuna, og sent verður mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 15-16.

Nú mentanin var serliga hart rakt í 2020, tí spæli-støð vórðu stongd, pallar tiknir niður, og fólk ikki kundu savnast, legði Nón seg kortini eftir at halda fast við at seta mentanina ovast og støðugt umrøða mentanarlig tiltøk, rák og rembingar, og hava samrøður við fólk, sum fáast við mentan.

Ætlanin er at vaksa sendingina uppaftur í seks tímar um vikuna í 2021. Tá fara vit aftur at hava tematýsdagar, mentanarmikudagar og hósdagar við hóskandi tilfari. Í 2020 gjørdu Ingi Rasmussen og Leif Láadal Nón.

Nón er enn sum áður ein sending við djúphugsni og fynd; samrøðurnar eru longri og djypri, enn vit eru von við í einum samfelagi, har hjólini mala skjótt, og fólk hava vant seg við stutt og skjót tíðindi.

Málið er at geva lurtaranum upplýsing, uppliving og undirhald gjøgnum beinleiðis útvarp, kryddað við reportasjum, frásagnum og kjaki, har stundir eru til longri samrøður, viðgerðir og greiningar.

**GÓÐAN MORGUN FØROYAR**
Góðan morgun Føroyar er á skránni hvønn gerandismorgun frá klokkan 7.35 til 9.50. Hóast samfelagið varð sett niður í ferð frá 12. mars, helt morgunsendingin á at senda sum vant. Toymið varð skipað soleiðis, at tvey og tvey arbeiddu saman, og neyvar arbeiðsgongdir vórðu fylgdar.

Evnisliga fylti korona rættiliga nógv. Eitt serligt átak, sum sendingin tók stig til, var at savna tjóðina í sangi. Heitt var á føroyingar at syngja Fagra blóma, filma løtuna og senda upptøkuna til Kringvarpið.

Alt bleiv sett saman og sent á netinum, í føroyska sjónvarpinum – eins og bæði DR og TV2 gjørdu av at vísa sangin í bestu senditíð.

Fleiri nógv sæddar stroymingar vórðu gjørdar í 2020. Nevnast kann, at stroymt varð beinleiðis, tá morgunsendingin fann Ársins granna. Sama bleiv gjørt ein morgunin í Klaksvík, tá sendingin stílaði fyri, at Hallur Joensen spældi uttandurakonsert





fyri búfólkum á ellisheiminum.

Mikudagar hava ymsir serfrøðingar verið í sendingini og greitt frá sínum serøki. Eitt nú heilsufrøðingur, persónligur venjari, gartnari, fíggjarráðgevi, parráðgevi og seksologur.

Á fimta sinni leitaði morgunsendingin eftir ársins orði. Hetta varð sum vant gjørt saman við lurtarum og Málráðnum. Tá avtornaði, varð orðið "sóttarhald" kosið ársins orð í 2020.

Morgunsendingin leggur seg eftir at vera undirhaldandi og upplýsandi. Málbólkurin er breiður, og tað sæst aftur í mongu evnunum, ið verða viðgjørd.

**DANSIVAL**
Kvæðasendingin Dansival var aftur á skránni hjá útvarpinum í 2020 – frá ársskiftinum til føstulávintsmánakvøld og aftur frá heystinum og til ársskiftið.

Fyri at fáa fjølbroytni í sendingina verða kvæða- og dansihugað boðin til sendingina sum gestir. Tey velja nøkur kvæði, vísur ella tættir og hava eitt prát við vertin.

Verturin, Jóhan Mortensen, hevur miðað eftir at hava gestir úr flest øllum landspørtum. Samanlagt hava um 100 fólk verið gestir í Dansivali.

**EFTIR GRÁSÚLU Í MYKINESHÓLMI OG Á FJALLI Í TRØLLHØVDA**
Aftur í 2020 hevur sendingin "Við Tórði á túri" havt nógv spennandi á skránni. Umframt at vitja smápláss sum Skúvoy, Mikladal, Gásadal og Norðtoftir, hevur verturin Tórður Mikkelsen m.a. verið í Runavík og eisini í býlingum í størri plássum. Tann forvitna mikrofonin hevur eisini verið í Sandoyartunlinum, so lurtararnir fingu innlit í, hvussu tað er at arbeiða har.

Tað hava eisini verið serliga hendingaríkir og spennandi túrar. Eitt nú túrurin saman við mykinesmonnum eftir grásúlu í Mykineshólmi og saman við kirkjubømonnum á fjalli í Trøllhøvda, har fólk ikki vanliga koma. Og ein av sendingunum hevði heitið "Við Tórði á túri á Oyrasundi". Hon lýsti útisetalívið hjá lesandi føroyingum í Keypmannahavn. M.a. kom fram, at á Oyrasundi er ein serlig inniskógvamentan millum føroyingarnar.

Í sendingini "Við Tórði á túri" verður varpað ljós á gerandisdagin hjá fólki kring landið. Forvitni er drívmegin, og evni, ið ikki skapa yvirskriftir í miðlunum, hava mangan stóran týdning fyri fólkið á staðnum.

**BRUNSJ**
Brunsj er beinleiðis útvarpssending hjá Kringvarpinum, ið bjóðar øllum føroyingum til lætt og undirhaldandi útvarp. Ein blanding av samrøðum, ummælum, tónleiki, kendum gestum og mongum øðrum.
Vertur: Eyðfinn Jensen.

**MEG MINNIST**
Sendirøðin Meg minnist byrjaði í 2009. Í røðini leggur Jógvan Arge dent á at fáa fólk at siga frá slíkum, sum tey vita og hava upplivað.

**QUIZTURIN – SPURNARKAPPINGARNAR Í ÚTVARPINUM LEYGARKVØLD**
Í 2020 varð farið á Quiztin í januar mánaði, og orsakað av koronufarsóttini var finalan ikki á skránni fyrr enn í desember. Kappingin hildnaðist annars væl, og luttakararnir vóru eitt nú tingfólk, prestar, miðlafólk, ítróttafólk, tónleikarar, vinnulívsfólk og fólk, ið høvdu skrivað yrkisbókmentir.

Finalan, ið varð hildin í Gamla skúla í Sørvági, eydnaðist sera væl, og tá samanum kom, vóru tað prestarnir Marjun í Kálvalíð og Bergtórur Hjelm Bjarkhamar, ið vunnu kappingina á Quiztinum 2020.
Gunnar Nolsøe legði kappingina til rættis.

**UMHVØRVIÐ OG EG**
'Umhvørvið og eg' er ein sending, sum varpar ljós á tey viðurskifti, sum tú og eg hava ávirkan á, tá tað snýr seg um at verja umhvørvið. Ljós verður varpað á góðar vanar og á arbeiði – bæði frá privatari og frá almennari síðu, sum kann vera við til at verja umhvørvið. 13 partar vórðu gjørdir av røðini 'Umhvørvið og eg'.
Vertur er Elin Michelsen.

**TÁ MAKRELURIN BROYTTI FØROYAR**
Útvarpssending í seks pørtum um hvussu uppsjóvartilfeingið hevur broytt føroyska samfelagið. Soleiðis verður sagt um sendirøðina: "Tað er ein sannroynd, at avgerðin um at hækka føroysku makrelkvotuna fyri umleið 10 árum síðan hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri partar av okkara fiskivinnu og somuleiðis fyri búskaparligu framgongdina í Føroyum seinnu árini".
Søgan 'Tá makrelurin broytti Føroyar' er ongantíð lýst samanhangandi, og tað verður roynt í hesi sendirøð.
Kári Mikkelsen legði sendirøðina til rættis.

**PARALIG**
Hvat er tað, sum ger, at fólk koma saman, verða góð og blíva par? Hvør er uppskriftin upp á tað góða parlagið, og hvussu væl kenna makarnir í grundini hvønn annan?
Hetta eru nakrir spurningar, sum verða viðgjørdir í sendingini 'Paralig'. Fýra ymisk pør greiddu frá, hvussu tey hittust, um kærleikan og royndu seg, hvussu væl tey kendu hvønn annan.
Rúni Jákupsson legði til rættis.

**EIN BÝUR Í KINA**
Sendirøð um stórveldið Kina, sum Jóhanna Magnusardóttir og Dávid Fossdálsá hava lagt til rættis. Tey bæði hava lisið í Kina og duga kinesiskt. Í røðini hoyra vit um handilskríggj, kommunismu, kristindóm, jarðskálvta, framleiðslu, útflutning og málpolitikk.
Dávid Fossdalsá og Jóhanna Magnusardóttir leggja til rættis.

**DREYMURIN OG DROTNINGIN**
Útvarpsdokumentarur um aloe vera-fyritøkuna Forever Living, sum hevur knýtt hundraðtals

føroyskar kvinnur at selja fyri seg. Fleiri kenna seg snýttar, og ein teirra er Milja Kristina Joensen, sum í dag kennir seg snýtta av fyritøkuni, hvørs bygnaður byggir á pyramiduspæl.
Finnur Koba legði til rættis.

**UFO-KJALLARIN**
Poddvarpsrøð um flúgvandi borðdiskar og um fremmandar verur frá øðrum gongustjørnum, sum hava vitjað okkum her á jørðini.

Um sendingina siga teir, sum gera hana, at: "Tey allar flestu okkara munnu minst eina ferð hava sitið í havanum og hugt upp móti stjørnunum og hugsað um, hvørt vit veruliga eru einsamøll í alheiminum, ella um okkurt meira man vera harúti. Søgurnar um ljós í myrkrinum ella flúgvandi talerkar eru nógvar, men eru tær sannar? Í hesi poddvarpsrøð fara vit at skifta orð um fyribrigdið UFO og alt, sum hartil hoyrir".
13 partar eru gjørdir í røðini 'UFO-kjallarin', sum Jónfinn Stenberg legði til rættis.

**KORONUKRÁKAN**
Sending, ið var send á nýggjárinum, har fimm tær óhepnastu avgerðirnar í 2020 vórðu funnar. Stutt um sendingina er, at koronukreppan vendi øllum samfelagnum á høvdið, og har vóru nøkur, ið skaraðu framúr við óhepnum avgerðum. Í sendingini verður gjørdur ein topp 5-listi, og tosað verður við hesar óhepnu koronukrákurnar.
Finnur Koba legði til rættis.

**TRÍGGIR POPPARAR HITTAST**
Sendirøð í trimum pørtum um tríggjar lokalar synir – Óli Poulsen, Hans Poulsen og Niclas Johannesen, allir úrmælingar innan tónleikaframleiðslu – sum hittust í Skótahúsinum í Runavík fyri at práta og hugleiða um hetta at framleiða tónleik.
Eyðfinn Jensen legði røðina til rættis.

**SUMMARIÐ UTTAN G!**
Við gomlum konsertupptøkum og samrøðum var G! festivalurin, sum bleiv avlýstur orsakað av koronafarsóttini, hátíðarhildin.

Í sendingini eru samrøður við fólk, ið eru miðsavnandi í G! festivalinum, og har G! festivalurin hevur verið miðsavnandi fyri tey. Eisini eru nakrar av bestu konsertupptøkunum, sum eru gjørdar í sambandi við G! festivalin millum ár og dag, at hoyra.
Uni Leitisstein Hansen legði sendingina til rættis.

**KAMBAN**
Sendirøð í átta pørtum, sum Hanus Kamban hevur lagt til rættis. Sjálvur sigur hann um sendirøðina, at: "Innihaldið í sendingunum er ætlað at vera fólksligt og – vónandi – undirhaldandi, men eisini mentanarliga og musikalskt gevandi.

Sendingarnar eru settar saman av tónleikabrotum og hugleiðingum við staðbundnum, persónligum og kosmopolitiskum dámi. Hugsanin er at royna at framleiða tilfar, sum áhoyrarar kunnu kenna seg aftur í, og sum lutvíst – við tað at ein vitjar aftur á mið úr eins persónliga lívi – stundum kann fáa ein persónligan koloritt".
Hanus Kamban legði til rættis.

**FRÍTÍÐ OG NÁTTÚRA KRING ALT LANDIÐ**
Tá tann seinasta Frítíð og Náttúra úr Koltri varð send 20. september í 2020, kundi journalisturin, Jóhann Mortensen, staðfesta, at nú hevði Frítíð og Náttúra vitjað allar oyggjarnar, har fólk býr.
Í fjør vórðu sendingar gjørdar úr Svínoy, Kunoy, Stóru Dímun og úr Koltri og aðrastaðni.

Í sendingunum hava góð frásøgufólk greitt frá ymiskum í náttúruni. Tað veri seg um fugl, seyð, sjósíl, ross, torv, hús, viðavøkstur og annan gróður. Fleiri túrar vóru eins og árini undan eftir bygdagøtum, har frásøgufólkini hava sagt frá staðanøvnum, umhvørvinum, siðum og søguligum hendingum. Í fjør var Frítíð og Náttúra eisini ein ríðingartúr í Vágum – úr Miðvági, fram eftir Vørðunum og norðuri á Fjøllum.

Á hesum túrum hava frásøgufólkini og journalisturin miðað eftir at taka lurtaran við á eina ferð í náttúruna, so lurtarin hoyrir áartutl, fuglaljóð, hoyrir seyð jarma, ella bara lotið, og soleiðis kann ímynda sær náttúruna og túrin.
Lurtarar hava ofta nevnt, at sendingarnar hava givið íblástur til túrar í náttúruni.
Til samans hevur Jóhann Mortensen gjørt beint oman fyri 200 sendingar Frítíð og Náttúra.





# ÍTRÓTTARSENDINGAR

| | |
|---|---|
| 10. jan.: | Litava-Føroyar (Hondbóltur, spælt í Luksemborg) |
| 11. jan.: | Føroyar-Slovakia (Hondbóltur, spælt í Luksemborg) |
| 12. jan.: | Føroyar-Luxemburg (Hondbóltur, spælt í Luksemborg) |
| 15. feb.: | Steypafinala (Hondbóltur) |
| 22. feb.: | Steypafinala (Flogbóltur) |
| 6. jun.: | Kappróður, Norðoyastevna |
| 13. jun.: | Kappróður, Eystanstevna |
| 20. jun.: | Kappróður, jóansøka |
| 27. jun.: | Kappróður, Sundalagsstevna |
| 11. jul.: | Kappróður, Fjarðastevna |
| 18. jul.: | Kappróður, Vestanstevna |
| 28. jul.: | Kappróður, ólavsøka |
| 26. aug.: | Young Boys-KÍ (Fótbóltur) |

| | |
|---|---|
| 27. aug.: | B36-FC Levadia (Fótbóltur) |
| 3. sep.: | Føroyar-Malta (Fótbóltur) |
| 6. sep.: | Andorra-Føroyar (Fótbóltur) |
| 24. sep.: | KÍ-Dynamo Tbilisi (Fótbóltur) |
| 7. okt.: | Føroyar-Danmark (Fótbóltur, vinardystur) |
| 8. okt.: | Føroyar-Spania (Fótbóltur, U21) |
| 10. okt.: | Føroyar-Lettland (Fótbóltur) |
| 13. okt.: | Føroyar-Andorra (Fótbóltur) |
| 14. nov.: | Lettland-Føroyar (Fótbóltur) |
| 17. nov.: | Malta-Føroyar (Fótbóltur) |
| 22. nov.: | Steypafinala (Fótbóltur, kvinnur) |
| 28. nov.: | Hálvfinala (Fótbóltur, menn) |
| 29. nov.: | Hálvfinala (Fótbóltur, menn) |
| 5. des.: | Steypafinala (Fótbóltur, menn) |





# SAVNSGULL

Verkætlanin SavnsGull varð sjósett í 2014 við tí endamáli at talgilda eldra partin av kringvarpssavninum. Tá talgildingin er komin í eina trygga legu, skal arbeiðast fyri, at savnið verður atkomuligt fyri almenninginum.

Savnið í Kringvarpinum varðveitir ein stóran part av tí, sum er hent í Føroyum frá 6. feb. 1957, tá Útvarp Føroya varð sett á stovn, og fram til dagin í dag. Í apríl mánaði í 1984 varð okkara søga eisini goymd á livandi myndum, tá SVF sendi fyri fyrstu ferð. Tilfarið í savninum er framleitt óheft og hevur tí ein serligan týdning fyri eftirtíðina.

Møguleikin at breiða út dygdargóða tilfarið skal vera til staðar á alnótini, tí á alnótini ferðast vit í ymsum støðum, ogna okkum førleikar, fáa nýggj hugskot og hava møguleikan at skapa nýggja vitan. Hetta kann vera gróðrarbotnur fyri lívslangari læring. Tað er í hesum meldrinum av upplýsing, at SavnsGull skal vera til staðar.

Í pappírssavninum eru nærum øll tíðindi varðveitt frá byrjan. Fyrsta sending varð send 6. februar 1957, og fram til 1996 komu talgildar loysnir so líðandi í staðin fyri pappírssavnið. Hetta savnið er sera rúgvusmikið og telur oman fyri 500.000 skjøl. Øll skjølini eru um at verða talgildað, og oman fyri 400.000 skjøl eru nú skrásett, soleiðis at tað ber til at finna tilfar fram.

Í útvarpssavninum eru alskyns sendingar, ið lýsa okkara nýggju søgu. Tað eru beint niðan fyri 27.000 bond í savninum. Hóast vit hava havt avbjóðingar við bandmaskinunum, ið eru gamlar og tørva ábøtur, er væl komið burturúr, og væl oman fyri 24.000 bond eru talgildað.

Í 2021 verður seinasta ferðin til Belgia við sjónvarpsbondum, har tey verða talgildað. Tá eru oman fyri 14.000 bond talgildað, og øll eru tá varðveitt fyri eftirtíðina.

Nú vit eru komin langt í bjargingini, ræður um at fara undir at geva almenninginum atgongd til hetta tilfarið. SavnsGull og KVF eru farin undir eina tilgongd at loysa uppgávuna.





# ÁTRÚNAÐARLIGA ØKIÐ

Koronustøðan broytti alt og øll í 2020, eisini skrá og mannagongdir, tá tað snýr seg um átrúnað.

**HETTA HEILAGA EVANGELIIÐ SKRIVAR**
Hendan sendingin verður send hvørt leygarkvøld kl. 17.45 og endursend sunnumorgun kl. 8.45. Tað eru ymiskir prestar, sum skriva eitt kirkjuár í senn. Eitt kirkjuár byrjar og endar fyrsta sunnudag í advent. Hetta skeiðið skrivar og lesur Anne Mette Greve Klemensen. Koronutíðin gjørdi, at ikki bar til hjá fólki at koma innar í KVF at lesa, so tá Anne Mette var í sóttarhaldi, las hon HHES inn heima hjá sær í Nólsoy.

**SÁLMASAVNIÐ**
Vit løgdu gamla sálmasavnið út. Eisini hava vit lagt upptøkur av øllum landsins kirkjuklokkum út á heimasíðuna. Nýggja sálmasavnið hevur verið brúkt til jarðarferðir í koronudøgunum og eisini til føroyskar guðstænastur í Danmark.

**ANDAKTIR Í SJÓNVARPINUM**
Andakt er hvørt sunnukvøld kl. 19.50 og verður einans flutt av serligum ávum. Tað eru ymsar samkomur og kirkjur, sum skriva og lesa hesar andaktir. Á mishalgidøgum/hátíðum eru tað prestar í Fólkakirkjuni, sum skriva og lesa. Hesar andaktir verða tiknar upp í ymsum kirkjum.

**MØTI Í ÚTVARPINUM**
Seks ferðir um árið senda vit evangeliskt møti hjá Brøðrasamkomuni. Vanliga verða tey send sunnudag kl. 17.00. Vit fáa tey sum lidna framleiðslu at senda.

**MORGUNLESTUR**
Prestar kring landið skriva og lesa morgunlestrar. Koronustøðan gjørdi, at prestar lósu inn í sínum kirkjum. Tøkningar frá KVF fóru til kirkjurnar og tóku upp, m.a. Tvøroyrar og Hoyvíks kirkju og heima hjá Finni Hansen, tøkningi.

**GUÐSTÆNASTUR OG MØTI**
Guðstænastur og møti annars verða send ymsastaðni frá í landinum. Tá søkur og stevnur eru, royna vit at senda guðstænastur higani. Møtini og guðstænastur annars eru úr Katólsku Mariukirkjuni, Hvítusunnusamkomuni, Kelduni, Oasuni, Adventistakirkjuni, Kirkjuliga Heimamissiónsfelagnum, Brøðrasamkomuni, Frelsunarherinum og Heimamissiónini.

Vit hava sent eina guðstænastu í útvarpinum og eina aðra í sjónvarpinum. Ferðaliðið eru fríyrkisfólk, sum taka upp til sjónvarpið. Eisini her broytti koronustøðan alt. Tá alt varð stongt, gjørdu vit av at endursenda gamlar sjónvarpsupptøkur sunnumorgun kl. 11.00, men skjótt varð samtykt, at vit máttu upphugsa nýggjan leist. Í samráð við Fólkakirkjuna sendu vit so beinleiðis guðstænastu úr Havnar kirkju. Sálmarnir, sum ljóðaðu, vóru úr kringvarpssavninum. Prestur prædikaði á kórsgáttini. Urguleikarin í Havnar kirkju, Gudmund Mortensen, segði seg vilja spæla inn nýggj orgulløg til pre- og postludium til hesar serstøku guðstænastur. Alexander Gaard tók upp eitt kvøldið í kirkjuni. Hesar guðstænastur vóru serstakar, og inn komu nógvar viðmerkingar, og myndin av tómu kirkjuni ávírkaði fólk. Nógv sendu Kringvarpinum boð um, at løgið var at sita og binda og hyggja eftir guðstænastuni og ikki kunna fara í kirkju sum vant.

**TULKING OG TEKSTING**
Vit høvdu eisini teknmálstulk. Vit tekstaðu alla guðstænastuna beinleiðis, og hetta var so byrjanin til eina nýggja mannagongd, tí tá vit aftur kundu fara í kirkjurnar at taka upp, gjørdu vit av at senda somu beinleiðis guðstænastu í útvarpi og sjónvarpi og teksta alt. Ofta nær prestur at senda okkum prædiku beint áðrenn, og so verður hon eisini tekstað. Møtini verða ikki send beinleiðis, men vit teksta sálm og sangir, og er annað, tey vilja, at vit skulu teksta, so gera vit tað.

Samanumtikið verður hildið, at hetta er gongd leið, og framleiðslugóðskan er munandi betri. Koronuguðstænasturnar byrjaðu 22. mars og vardu 10 sunnudagar fram. Men allar tær serstøku guðstænasturnar og allar søkurnar og stevnurnar hava so ikki verið í ár.





**NÝGGJÁRSGUÐSTÆNASTAN**
Hetta er guðstænasta, sum verður send nýggjársaftan og endursend nýggjársdag. Nýggjársguðstænastan skuldi takast upp leygardag 21. november í Havnar kirkju, men vegna ódnarveður varð hon tikin upp sunnudag 22. november kl. 17.00. Anne Mette Greve Klemensen prædikaði, Bjarni á Steig las upp á kórsgáttini frá Prædikaranum, og Marian Hansen las hugleiðingar, sum Alexander Kristiansen hevði skrivað, meðan hann var í sóttarhaldi í Fugloy. Tarira sang, og Spælimenninir í Nólsoy spældu postludium. Guðstænastan var ikki almen, men Havnarkórið og Tarira sótu spjødd í kirkjuni og sungu, og nøkur fá fólk, sum høvdu leitað sær inn í kirkjuna, luttóku eisini.

**CREDO**
Hesar sendingar eru hvønn sunnudag kl. 10.10, har roynt verður at varpa ljós á átrúnað og onnur menniskjanslig viðurskifti og rák.

**ETOS**
Eisini her gjørdi koronustøðan seg galdandi, tí ikki bar til at gera nýggjar upptøkur, so sendar sendingar komu á skrá. Tá ein tíð var frálíðin, settu vit Etos á skránna, har vit royndu at varpa ljós á etisku tvístøðurnar hesa løgnu tíð. Gestur í Etos-sendingunum var lærari í heimspeki, Jógvan D. Hansen.






# BIIT AV BAKKASTOKKI

Ungdómsverkætlanin Biit varð av álvara skotin í gongd um ársskiftið. Umleið 15 fólk millum 15 og 24 ár eru knýtt at ungdómstoyminum. Hesi ganga øll í skúla ella hava annað starv, tí er talan um fríyrkisarbeiði. Á Biit framleiða tey tilfar til netið burturav. Tey framleiða ikki til sjónvarps- ella útvarpsskránna.

Heimasíðan Biit.fo er miðdepil fyri alt tað, Biit framleiðir. Síðan er skipað í røðum. Tað vil siga, at hvør einasta framleiðsla verður bólkað undir eitt ávíst rað, sum síðan hevur ymiskar partar undir sær.

13 ymiskar røðir eru á Biit.fo nú. Talan er um video, poddvarp og greinar av sera ymiskum slagi. Poddvarprøðin 'PolEtikk' viðger í trimum pørtum átrúnað og poletikk. Fyrsti partur í videorøðini 'Doku' er eitt innlit í eitt kollektiv, har fýra ungdómar búgva. 'Antigram' er ein poddvarprøð um rák og mótrák á sosiala miðlinum Instagram. Greinarøðin 'Stríðið, sum ikki sæst', er samrøður við føroyskar ungdómar um kenslur og loyndarmál.

Næstu røðirnar, sum koma á Biit.fo, eru tvær videoframleiðslur, har tvey ung fólk, sum stillaðu upp til kommunuvalið, verða lýst, og so ein skemtirøð við heitinum 'Gerið góðar gerðir'.

Umframt at liggja á Biit.fo er partur av tilfarinum eisini at finna á eitt nú Spotify og poddvarp-appini hjá Apple.

Rólant Waag Dam er verkætlanarleiðari, og Eyðbjørt Skylv Midjord og Barbara Hentze í Stórustovu eru eisini knýttar at Biit.



# BARNA-SJÓNVARPIÐ



**BARNASJÓNVARPIÐ Í KORONUTÍÐINI**
11. mars sendu vit Dag og viku fyri børn á fyrsta sinni. Innihaldið var upplýsandi, undirhaldandi og varpaði ljós á koronu, og hvat børnini gjørdu, nú tey vóru heima. Fleiri sendingar vórðu gjørdar, og fingu vit góðar afturmeldingar frá hyggjarunum.

Í koronutíðini bar ikki til at lesa teknifilmar inn, men vit sendu hvønn morgun úr fjølbroytta kringvarpssavninum, so børnini hvønn morgun sóu Mumi, Emil, Karlsson, Heidi og mong, mong onnur. Vit fingu eisini loyvi at leggja tilfarið hjá Astrid Lindgren út á netið.

**SAKIN**
Tá ið skúlarnir byrjaðu aftur eftir korona, vóru vit til reiðar við nýggjari barnasending í barnasjónvarpinum. Fyrsti partur av Sakini var 15. mai 2020, og røðin var á skrá hvørt fríggjakvøld klokkan 18.30 og eftir Dag og Viku. Innihaldið var sera fjølbroytt og viðkomandi og var ætlað børnum í skúlaaldri. VIT taka sakina í egnar hendur og vísa á og tosa við áhugaverd og skilagóð børn um áhugaverd og viðkomandi evni. Petur Háberg tosar um kenslur við Petursa borð, vit fáa nógv at vita um dagar og vikur, og nógv verður gjørt burtur úr grafikki. Vit spæla okkum í studio við chroma key, so verturin er í talgildari verð. Eftir summarsteðgin var Sakin á skrá annaðhvørt fríggjakvøld, og annaðhvørt fríggjakvøld var Pipp Papp Hey á skrá. Sakin er sakin, siga børnini, og tí halda vit fram við at framleiða sendingina, sum skal endurspegla áhugamál, pall og evni hjá føroyskum børnum.

**RØÐIR TÝDDAR TIL FØROYSKT**
Fleiri røðir vórðu bílagdar, sum vórðu týddar til føroyskt. Ein teirra er Sára og Dunnan, sum er teknifilmur um sjey ára gomlu Sáru og hennara besta vin Dunna. Vit fylgja teimum báðum á ymiskum ævintýraferðum. Røðin er ætlað teimum 4-6 ára gomlu og er í sendingini Snipp Snapp. Mouk er onnur teknirøð, har málbólkurin er tey 3-6 ára gomlu. Tey ferðast kring heimin og læra ymsar mentanir at kenna.

Hvørt týskvøld eru djórasendingar í barnasjónvarpinum. Vit hava sæð 'Alt um djór' og røðina 'Dýralív'. Eisini keyptu vit røðina 'Harðbalin djór', sum er til týðingar, og verður send í næstum. Málbólkurin er størri børn, 7-12 ár. Vælkenda røðin um ponyrossini var eisini á skrá, og hetta er ein umfatandi framleiðsla við sangi og nógvum leikarum. Umframt hesar røðir vórðu fleiri bílagdar, eitt nú Peppa Pig, PJ-Masks og annað. Hesar verða týddar sum skjótast og lisnar inn, so at spentu børnini kunnu gleða seg til í heyst.

# BARNAÚTVARPIÐ




**FØROYSKAR SØGUR**
Við ársbyrjan byrja vit sum oftast árið við føroyskum søgum, og so var eisini í 2020, tá ið vit sendu søgur úr nýggja stuttsøgusavninum hjá Steintóri Rasmussen. Síðan fóru vit á ferð við mikrofonini og hoyrdu um áhugaverd evni, sum børn kring landið so skilagóð greiddu frá.

'Handbók fyri superhetjur' er nýggj og sera væl umtókt bókarøð, sum vit í barnaútvarpinum sendu sum ljóðmynd. Í tveimum umførum hoyrdu vit um Lisu, sum ikki trívist í skúlanum. Ein dagin kemur hon fram á eina bók á bókasavninum, ið er um, hvussu tú kanst gerast superhetja. Sera spennandi og ferðamikil ljóðmynd um eina gentu, ið tekur málið í egnar hendur.

Vit fingu nógv brøv frá børnum, sum bjóðaðu okkum at vitja tey, og stuttligt var at hoyra søgurnar og áhugamálini, sum tey ynsktu at greiða frá í sendirøðini 'Lova mær við'.

**BARNAÚTVARP VIÐ FRÁSTØÐU**
12. mars, tá ið børn og vaksin fóru heim, tí korona fór at gera um seg, gjørdu vit av at senda koronubarnaútvarp við frástøðu hvønn gerandismorgun. Onnur var á Argjum, og hin var stødd í Hoyvík, og soleiðis samskiftu vit við mikrofonini, telefonini og telduni og tosaðu við børn ymsastaðni í Føroyum, sum søgdu frá, hvat tey gjørdu, nú tey vóru stødd heima. Vit tóku stig til fleiri kappingar, sum millum annað snúðu seg um at rudda, endurnýta og gera ymiskt kreativt við tí, sum vit hava heima. Eitt nú sendu børnini myndir inn av ymsum, sum var útgingið, kryddarí og pakkar av ymsum slagi. Myndirnar vórðu lagdar á heimasíðuna, og síðan høvdu vit lutakast. Tað bar eisini til at senda koronumyndir inn, sum søgdu eitt sindur um, hvussu gerandisdagurin var hjá teimum í koronutíðini. Fleiri hundrað myndir komu inn og vórðu lagdar á heimasíðuna kvf.fo/vit.

Barnaútvarpið var at hoyra klokkan 7.15 og klokkan 9.30 og endursent á kvøldi. Vit fingu sera nógvar afturmeldingar, og børnini hildu, at tað var stuttligt at lurta, tá ið tey ótu morgunmat klokkan hálvgum tíggju. Í alt vóru 23 koronusendingar gjørdar við fjølbroyttum innihaldi.

**ÆVINTÝR, MÓRUGØTA OG ÚTVARPSLEIKIR**
Móti sumri sendu vit ævintýr eftir H.C. Andersen og aðrar ljóðmyndir, eitt nú 'Birita og summargávan'. Bókin 'Innantanna Anna og túsundbeinið Súni' eftir Oddfríða Marna Rasmussen og útvarpsleikurin um 'Anniku úr Dímun' vóru eisini at hoyra. Stuttliga søgan 'Høgni verður ein høsnarungi', sum eisini viðger álvarslig evni, var at hoyra hvønn sunnumorgun í summarsteðginum.

Á hvørjum ári eru vit í Mórugøtu 8. Í november 2020 hoyrdu vit um Kenneth, Katju og Jón og so sjálvandi eisini um vikarin. Vit hoyrdu spennandi og stuttligar søgur um teldur, telduspøl, foreldrafund og mangt, mangt annað. Eisini hoyrdu vit óhugnaligu ljóðmyndina 'Kalt blóð' og stuttliga útvarpsleikin um 'Herviliga Henry'.

**FORNT**
Fornt var nýggjur útvarpsleikur í Kringvarpinum í desember. Fornt var jólagávan til børnini í 2020. Gávan var nýskrivaður útvarpsleikur í átjan pørtum. Leikurin er nútíðarleikur, ið er ætlaður teimum eldru børnunum. Fornt er eitt heimskent telduspæl, sum er sera spennandi, tí her kanst tú granska og jagstra. Elin á Røgvi hevur skrivað útvarpsleikin Fornt. Høgni Fagraberg hevur gjørt ljóðmyndina. Til útvarpsleikin gjørdi Nám undirvísingartilfar, soleiðis at tað bar til hjá næmingum at fara inn á Snar.fo gerandismorgnar í desember.

# FRAMHALDSSØGUR OG STUTTSØGUR

Í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya sendu vit í alt 11 framhaldssøgur og tvær stuttsøgur í 2020.

Stuttsøgurnar vórðu sendar um jólini, og er hetta talan um endursendingar, sum hóskaðu til høgtíðina.

Framhaldssøgur verða sendar tríggjar ferðir um vikuna alt árið, mánakvøld, hóskvøld og sunnukvøld. Mánakvøld senda vit klassikararnar, sum á heimasíðuni kallast 'Góðu søgurnar'. Hóskvøld senda vit framhaldssøguna til vaksin, og sunnukvøld verður ungdómsframhaldssøgan send. Allar søgurnar verða endursendar ymiskar tíðir í vikuni, so góður føroyskur søgulestur javnan er at hoyra.

Fimm av hesum 11 framhaldssøgunum vóru nýinnlisnar søgur, fýra vóru úr kringvarpssavninum og harvið sendar áður. Tveir søgulestrar fingu vit, ein frá Landsbókasavninum og ein frá Sprotanum.

Samanlagt vórðu sendar fýra ungdómsskaldsøgur. Tríggjar týddar og ikki sendar fyrr. Og ein uppruna føroysk ungdómsbók, hon varð endursend.

Góðu gomlu søgurnar, klassikararnir, vóru tríggjar í tali. Og tann seinasta heldur fram í 2021.

Framhaldssøgurnar til vaksin vóru fýra í alt. Tvær uppruna føroyskar og tvær týddar.

Søgurnar liggja á heimasíðu Kringvarpsins í ein mánað. Tað vil siga, tá seinasti partur er sendur, liggur øll søgan tøk í ein mánað.

Í 2020 varð fyri fyrstu ferð roynt at senda Dagsins yrking. Hvønn yrkadag í februar mánaði var ein yrking at hoyra á miðdegi, klokkan 12. 20 yrkingar vórðu sendar, fimm yrkjarar lósu tvær av sínum yrkingum í part, og fimm upplesarar lósu yrkingar eftir ymsar yrkjarar. Allar yrkingarnar vóru uppruna føroyskar.

Roynt verður í mest møguligan mun at skifta millum kvinnuligar og mannligar rithøvundar og upplesarar.








# TÓNLEIKAØKIÐ

2020 var eitt øðrvísi og óstøðugt tónleikaár, men hóast tað kom eisini nógv gott burturúr á tónleikaøkinum.

Vegna koronu hevur Kringvarpið í tíðarskeiðum verið stongt fyri fríyrkisfólkum, eins og starvsfólk hava arbeitt heimanífrá. Av somu orsøk hava fríyrkissendingar í útvarpinum verið óstøðugar, men í sjónvarpinum vórðu sokallaðar koronukonsertir framleiddar í stórum tali. Ongantíð fyrr hevur sjónvarpið sent so nógvar tónleikaframførslur sum í 2020.

Nógvur nýggjur, føroyskur tónleikur varð eisini skrivaður og framleiddur í 2020, tí tá spælistøðini og festivalarnir lótu aftur, fóru føroyskir tónleikarar undir at gera nýggjan tónleik.

Meira enn helvtin av spælda tónleikinum í útvarpinum var av føroyskum uppruna.

Umframt vikuligu tónleikasendingarnar vóru eisini aðrar stakar tónleikasendingar í sambandi við høgtíðir og merkisdagar.

'Spæl føroyskt'-vika var frá 2. til og við 8. mars, og tá varð einans føroyskur tónleikur spældur í øllum frumsendingum, á náttarrásini og ímillum sendingar annars í útvarpinum.

**VIKULIGAR TÓNLEIKASENDINGAR Í ÚTVARPINUM Í 2020:**

- **Mono** – nýggjar og sera ymiskar sendirøðir í 5 pørtum, við skiftandi vertum
- **Afturljóð** – popminni frá 50'-, 60'- og 70'unum
- **Áðrenn Elvis** – upprunatónleikur frá tíðini fyri Elvis og rock'n roll
- **Bolero** – klassiskur tónleikur við skiftandi vertum
- **Jazzofonin** – jazztónleikur við skiftandi vertum
- **Tempo** – andaligur tónleikur
- **Klassiskt sunnukvøld** – klassiskur tónleikur við verti
- **Kvørnin** – ummæli av føroyskum heildarútgávum og stakløgum
- **Norðurljóð** – nýggjur, norðurlendskur tónleikur
- **Plátubarrin** – beinleiðis leygarkvøldssending við verti, temaplátu og lurtaraynskjum
- **Temaplátan** – skiftandi útgávur verða viðgjørdar
- **Jambalaya** – sending við country-tónleiki
- **Ragnarokk** – sending við rokktónleiki
- **Óhoyrt** – sending við nýggjum tónleiki
- **Tit skriva, vit spæla** – sending við lurtaraynskjum og sms-heilsanum
- **Upp á gólv** – føroysk kvæði
- **Upp á tá** – norðurlendskur og føroyskur dansibandstónleikur
- **Leitisstein** – blandaður tónleikur



Ársins útvarpshitt varð kosið fyri aðru ferð í 2020. Talan var um eina atkvøðugreiðslu, ið gekk fyri seg á heimasíðuni kvf.fo í 'Spæl føroyskt'-vikuni. Yvir 9.000 atkvøður vórðu greiddar, og lurtararnir hjá KVF valdu sangin "Kostbar" við Inga Poulsen til at vera Ársins útvarpshitt í farna árinum 2019. Faroese Music Awards 2020 var í Norðurlandahúsinum tann 7. mars. Dagin fyri varð avgerð tikin um at broyta tiltakið vegna koronu. Sendingin varð send beinleiðis í sjónvarpinum, men tónlekaframførslurnar vórðu tiknar upp fyrr á degnum, og eingir áhoyrarar vóru í hølinum, tá vertirnir handaðu heiðurslønir og presenteraðu tónleikaframførslurnar.

### KRINGVARP FØROYA OG FMX

Kringvarp Føroyar og FMX, Faroese Music Export, byrjaðu nýtt samstarv um sjónvarpskonsertir. FMX samskipar konsertirnar, sum KVF tekur upp og sendir í sjónvarpinum undir heitinum 'Í luftini'. FMX nýtir konsertirnar til at marknaðarføra føroyskan tónleik uttanlands.

### TÓNLEIKARÁÐIÐ

KVF fremur innanhýsis vitanardeiling um nýggjan tónleik og avger, hvørjir nýggir sangir verða settir í umferð undir leiðslu av tónleikasamskiparanum. Á vikuligum fundum verður nýggjur tónleikur spældur, viðgjørdur og vigaður, áðrenn hann verður settur í umferð. Uppskotini koma frá tónleikarum, plátufeløgum, lurtarum hjá útvarpinum, limunum í tónleikaráðnum og starvsfólkum hjá KVF.

Tónleikaráðið er samansett av starvsfólkum í KVF, sum fáast við ella spæla nýggjan tónleik í útvarpinum. Í 2020 vóru limirnir: Rannvá G. Fossaberg, Høgni Fagraberg, Elin Michelsen, Rúni Jákupsson og Eyðfinn Jensen.

### ALMENT ÚTBOÐ VARÐ Á SUMRI Í 2020 AV HESUM TÓNLEIKASENDINGUM:

- Fimm MONO-tónleikasendingar í útvarpinum
- Tónleikasendingin JAZZOFONIN
- Tónleikasending við gospeltónleiki
- Tónleikasending við nýggjum tónleiki
- Tónleikasending við country-tónleiki

20 umsóknir vóru til allar sendingarnar, og av hesum vóru 11 til Mono-sendirøðir.

# KONSERTUPPTØKUR Í SJÓNVARPINUM Í 2020

- Nýggjárskonsert 2020
- Týr og Føroya Symfoniorkestur
- Konsertir í SALT: Hanus G. Johansen, Hamradun
- Orð og tónar á Reinsarínum: Bárður Johannesen, Ólavur Jacobsen
- Orð og tónar í Perluni: Hans Ravnsfjall, Jóhannes Andreasen og Birita Adela, Flytifólk
- Á Reinsarínum: Blátt Gras, Danny & Ingi, Mark the Messenger, Sangløta, Bárður á Lakjuni, Ragnar Finsson, Hanus G, Funksjón, Jólakonsert
- Í Perluni: Marianna Nagata við bólki, Robert McBirnie og Faroe Boys, Halleluja Sofus
- Í luftini: Eivør, Joe and the Shitboys, Teitur Lassen, Raske Drenge
- Tórshavnar Manskór
- Rani Nólsøe – útgávukonsert
- Eivør – útgávukonsert
- Blues Perlan – ein mini blues-festivalur
- Anton Liljedahl – í Løkshøll
- Hanus G. Johansen 70 ár
- Myndir fyri sologuitar eftir Kára Bæk
- Barnakonsertin 2020
- Norðurlandakonsert við Marius, Guðrið og Gretu
- Jólakonsert hjá Barnabata
- Syngja jólini inn
- Jólakonsert við Føroya Symfoniorkestri
- Kamarkórið jólakonsert í SALT
- Jól í Hátúni
- Beethoven 250 ár

Sjónvarpið vísir eisini javnan nýggj og eldri videoløg sum millumsendingar í KVF. Tónleikasamskipari: Eyðfinn Jensen.



# PUBLIC SERVICE-SKYLDUR HJÁ KRINGVARPI FØROYA

*Kringvarp Føroya hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Kringvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.*

*– úr kringvarpslógini*

**FØROYSKT MÁL Í KRINGVARPI FØROYA**
Kringvarpið er tilvitað um ábyrgdina og týdningin, ið stovnurin hevur fyri føroyska málið. Stremban okkara er, at allar sendingar, ið Kringvarpið framleiðir, eru á góðum, føroyskum máli. Fyri at lúka hesar ásetingar varð skipað fyri skeiði á heysti í 2020 í føroyskum fyri starvsfólki í Kringvarpinum. Anfinnur Johansen og Zakaris Svabo Hansen undirvístu. Eisini kann nevnast, at málsligar vendingar javnan verða umrøddar á intraneti okkara. Umframt hetta er málsendingin “Málteigurin” á skránni hvørja viku, har málserfrøðingur greiðir frá, og lurtararnir hava høvi at seta spurningar.

**TÝTT, ÚTLENDSKT TILFAR**
Av tí at fíggjarlig orka ikki hevur verið til at týða alt útlendskt tilfar til føroyskt og orsakað av rættindaspurningum, hevur Kringvarpið lagt seg eftir at týða so nógv barnatilfar sum gjørligt. Tað er umráðandi, at føroysk børn hava atgongd til útlendskar teknifilmar, sum eru týddir til móðurmálið, eitt nú “My Little Pony” og “Alt um djór”.

Kringvarpið hevur eisini týtt sendingar til vaksin, tó hevur tað í størstan mun verið talan um føroyskan tekst og ikki føroyska talu.

**TÆNASTUR TIL FÓLK, IÐ BERA BREK**
Tíðindasendingin Dagur og Vika varð deyvatulkað, tekstað og løgd á heimasíðuna í 2020. Eisini verður dokumentarurin hóskvøld tekstaður.

**SENDINGAR ÚTI UM LANDIÐ**
Kringvarp Føroya er fyri allar føroyingar, og tí er týdningarmikið, at stovnurin framleiðir tilfar úr øllum landinum. Við Tórði á túri er vikulig sending, sum vitjar øll økini í landinum og greiðir frá gerandisdegnum á bygd og í býi. Harafturat eru nógvar av sendingunum hjá Kringvarpinum regluliga kring landið. Eitt nú kunnu vit nevna útvarps- og sjónvarpstíðindini, Góðan Morgun Føroyar og seinnapartssendingina Nón, sum hevur útvarpað frá fleiri av mentanarvikunum í landinum.









**KEYPTAR FRAMLEIÐSLUR**
Fríyrkisfólk hava staðið fyri meginpartinum av framleiðsluni av vanligu ítróttarsendingunum. Til ítróttarsendingina 3-2 hevur Kringvarpið brúkt fríyrkismyndafólk og fríyrkisprogrammfólk til hvørja sending. Kringvarpið hevur havt góðar royndir av hesi loysn. Guðstænastur og møtir á sjónvarpsskránni hava verið framleidd av fríyrkisfólki gjøgnum drúgt áramál. Morgunlestrar og Hetta Heilaga Evangelið Skrivar í útvarpinum verða framleidd av fríyrkisfólki, eins og fríyrkisfólk standa fyri stórum parti av tónleikasendingunum í útvarpinum. Deyvatulkingin av Degi og Viku verður gjørd uttan fyri húsið. Eisini verða fríyrkisfólk brúkt í sambandi við framleiðslu av sjónvarpssendingum, eitt nú alt tilfarið til ungdómsmiðilin biit.fo. Útvarpssendingin Pressan verður somuleiðis framleidd av fríyrkisfólki. Kringvarpið hevur samanumtikið góðar royndir við at keypa tænastur frá fríyrkisfólki til programmframleiðslu.

**FØRLEIKAMENNING OG DYGD**
Kringvarpið hevur hildið fram við arbeiðinum at førleikamenna starvsfólkini innan fyrisiting, tøkni og journalistikk. Starvsfólk fáa møguleika at koma regluliga á skeið, sum eru viðkomandi fyri teirra arbeiðsøki. Í árligu menningarsamrøðunum, sum øll starvsfólk taka lut í, verður menning hjá starvsfólkinum umrødd og viðgjørd. Endamálið við hesum samrøðum er, at einstaka starvsfólkið skal fáa høvi at ávirka arbeiðsmenningina ein veg, sum bæði sampakkar við áhugan hjá starvsfólkinum og gagnar Kringvarpinum.

**PARTUR AV TILBÚGVINGINI**
Kringvarpið er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins. Avvarðandi myndugleikar hava listar við nøvnum og telefonnumrum, ið skulu nýtast, kemur samfelagið í eina støðu, har tørvur er á tilbúgving. Tað merkir, at Kringvarpið eftir eina lítla løtu kann varpa út, um eitthvørt álvarsamt hendir. Kringvarpið hevur nakrar ferðir sent tilbúgvingarútvarp í sambandi við ódnarveður. Sent verður út á kvøldarnar og náttina við.

**UNDIRVÍSING**
Kringvarp Føroya og Nám samstarva um at útvega tilfar til skúlar. Arbeitt verður støðugt við at gera allar sendingar tøkar, soleiðis at undirvísingarstovnar lætt og skjótt kunnu fáa atgongd til tilfarið, sum Kringvarpið framleiðir. Seinasta dømið er barnasendingin Fornt, har næmingar á miðdeildini fingu dygdargott undirvísingartilfar við støði í sendirøðini. Kringvarpsfólk vitja av og á skúlar, har greitt verður frá um public service, journalistikk og etikk.

# AVBJÓÐINGAR FYRI MENTAN, FELAGSSKAP OG TJÓÐARSAMLEIKA EFTIR 2020

Ein ráðstevna um mentanarbroytingar og public service í Føroyum

21. oktober var public service-ráðstevna, sum Kringvarpið skipaði fyri. Ráðstevnan var á Hotel Føroyum fyri innbodnum umboðum frá m.a. politiskum flokkum, fakfeløgum og mentanarstovnum. Sjóneykan varð sett á, hvat ið knýtir eitt vælferðarsamfelag saman, og hvønn leiklut public service hevur í at varðveita savningarmegi, fólkaræði og luttakan í menningini av bæði landi og nærsamfelagi.

Í setanarrøðuni vísti kringvarpsstjórin, Ivan Hentze Niclasen, á, at vit standa framman fyri tí størstu mentanarligu avbjóðingini tey seinastu mongu, mongu árini. Risastóru stroymingartænasturnar bjóða mentanum um allan heim av, og spurningurin um falstíðindi og vantandi álit fyllir alt meira.

Miðlavanarnir broytast eisini í Føroyum. Ein avleiðing er, at tað enska vinnur alt meira fram – serliga hjá børnum og ungum. Ein onnur avleiðing er, at savningarmegin viknar, nú føroyingar brúka minni tíð upp á alt tað, sum er føroyskt.

Tí fara vit inn í eitt stríð um uppmerksemi, sum vit ikki hava ráð at tapa, segði kringvarpsstjórin at enda.

Á ráðstevnuni vóru hesi at hoyra:

- **Silja Dögg Gunnarsdóttir** – forkvinna í Norðurlandaráðnum, Ísland
- **Morten Hesseldahl** – aðalstjóri í Gyldendahl, fyrrverandi mentanarstjóri í DR, Danmark
- **Keld Reinicke** – miðlaráðgevi og fyrrverandi programmstjóri í TV2, Danmark
- **Rógvi Olavson** – Fróðskaparsetur Føroya

Eisini var pallborðskjak við framløgufólkunum niðanfyri.
Uni Holm Johannesen var orðstýrari.














KRINGVARP
FØROYA

Kringvarp Føroya — Postsmoga 1299 — Norðari Ringvegur 20 — 100 Tórshavn